# Býarinnar Cowboys

Eingin annar tónleikabólkur minnir um Cowboy Junkies, tí tey hava sín egna serstaka stíl. Tey hava gjørt tað, ið fáir bólkar hava megnað ella torað, nevniliga skapt eina sjangru. Og tey spæla tað tey hava hug til og lata ikki tónleikaídnaðin stýra sær



*Cowboy junkies*

**TÓNLEIKUR**
*Bárður Olsen*

Cowboy Junkies vóru stovnað í 1984 í Toronto. Tað eru tey trý systkini Margo, Michael og Peter Timmins, og Alan Anton. Tey hava givið níggju fløgir út. Tey eru sera væl dámd av tónleikaummælarum, men ókend av øðrum fólkum. Tónleikablaðið Rolling Stone skrivar, at tey hava kultstatus. Tónleikurin er ein blandingur av blues, country og rock. Eingin annar tónleikabólkur minnir um Cowboy Junkies, tí tey hava sín egna serstaka stíl. Tey hava gjørt tað, ið fáir bólkar hava megnað ella torað. Tey hava skapt eina sjangru. Grundin til, at tey ikki eru serliga kend, er helst, at tey ikki bara hugsa um at selja. Í bólkinum er tað røddin hjá Margo, ið dominerar.

Fyrsta fløgan kom út í 1986. Hon hevur løgna heitið: ”Whites off earth now!!”. Hvat býr undir hesum, er ilt at siga. Hon var innspæld live. Bara ein mikrofon varð brúkt. Her er einki tvætl, tey seta seg niður og spæla. Á fyrstu fløguni eru mest coverløg. Hetta er sermerktur droymandi transu blues. Frá t.d deyðu blues legendunum, John Lee Hooker og Robert Johnson. Í sínum tunglyndi skrivar John Lee Hooker: ”I'll never get out of this blues alive”. Robert Johnson spælir sær við søguna um, at hann hevði fingið síni evnir við at selja sína sál til tann ónda. Um ein bara hugsar um tekst, so er hetta ikki ein serliga áhugaverd fløga. Blues tekstir plaga ikki at vera serliga áhugaverdir, sjálvt um tónleikurin er avbera góður.

Næsta fløgan kom út í 1987. Upptikin live í ”Church of the Holy Trinity” í Toronto. Aftur hesu ferð mest góð coverløg. Sera góðar innspælingar av ”I'm so longsome I could cry” hjá Hank Williams og ”Walking after midnight”. Kendasti sangurin hjá Cowboy Junkies er ”Sweet Jane” hjá gamla Velvet Underground sangaranum Lou Reed. Hesin sangurin var m.a á soundtrackinum til kultfilmin ”Natural born killers” hjá Oliver Stone. Filmurin, sum av onkrari løgnari grund, varð forboðin

í Føroyum. Í Degi og Viku ber væl til at síggja fólk verða skotin ella síggja lík liggja og flóta í gøtunum, men er tað á filmi, nei, so gongur tað ikki. So traðkar ”Big Brother” frælsi til at velja niður.

Ikki fyrr enn á triðju fløguni taka tey seg saman og skriva næstan allar tekstirnar. Fløgan eitur: ”The cauton horses”. Flestu av tekstunum eru úr samfelagnum tey liva í. Kann kallast sosialrealisma og sum næstan øll onnur, syngja tey eisini um kærleika. Sangurin: ”Cause cheap is how I feel” vísir, at tey hava talent fyri at skriva góðar tekstir. Eitt brot er : ”Half moon in the sky tonight, bright enough to come up with an answer to the question why is it that every time I see you my love grows a little stronger. But your memory leaves my stomach churning, feeling like a lie about to be revealed, but I'll horde all this to myself cause cheap is how I feel“. Michael Timmins skrivar næstan allar tekstirnar, men onkuntíð er tað Margo. Hon hevur eitt nú skriva tekstin í sanginum ”Witches“. Hann er um hvussu heksirnar royna at lokka hana at koma at luttaka í teirra sabbat. ”There are witches in the hills calling my name. Saying come join us sister, come kiss the flame. Come dance in the moonbeams, ride the night wind, make love to the darkness and laugh at man's sins“. Hetta er teirra fyrsta studiofløga. Sjálvt um hon fyrst varð tikin upp í einum staði, tey kallaðu studio547, nevnt eftir tí kenda dansistaðnum í New Your studio54.

Á fjórðu fløguni ”Black eyed man” samstarva tey við navnframa Townes Van Zandt. Hann hevur skrivað besta sangin hjá Cowboy Junkies: ”Cowboy Junkies Lament”. Hann er um gentuna, ið fer út at spæla, so koma dreingirnir at gera fortreð. Minnir um sangin: ”Góða mamma tað var ikki eg”, bara nógv betri. Besta brotið er hetta: ”Baby hit the back door breathin' real heavy said the boys in the alley wouldn't leave her alone. Mama did her make-up in a terrible hurry she finally got ready but the boys were gone. Mama don't you worry, night's approachin' there's a hole in heaven where some sin slips through, just close your eyes and dream real steady maybe just a little will spill on you. Dark don't lie. Dreams come true. Could be a few will see you through“.

Fimta fløgan eitur Pale sum Crescent moon. Hetta er ein rockkend fløga, men sermerkta Cowboy Junkies ljóðmyndin hoyrist alla tíðina. Í Rolling Stone stóð tað at lesa, at henda var á top 10, av bestu rockfløgum nakrantíð. Her eru fleiri sera góðir sangir. Her eru ma.a romantiskir sangir og sangir um farnar tíðir, tá skalpjagarar vóru uppi á døgum. Besti sangurin eitur ”Ring on the sill”. Eg vil meta, at hetta er ein tann besti kærleikssangurin nakrantíð. ”He lifts his glass from the table
It leaves a ring where it stood. He sees the light from the window. Caress her like he knows he should. He's remembering the first time he kissed her and how he'd wake and immediately he'd miss her, like a spell, with each breath, he'd taste her breath like a haunting, irritating as hell. Do you remember when you'd pray to never see the day when someone would make you feel this way. 'Cause you knew they would cut right through you and once inside, you were afraid they'd find nothing to hold on to“.

Cowboy junkies hava noktað at tilpassa seg tónleikinum, ið er væl umtóktur. Hetta eru góðir tónleikarir. Tey høvdu uttan trupulleikar klárað at gjørt eina fløgu, ið toppaði á hittlistum. Nú í hesum døgum, tá plátufeløg hava so ógvuliga stóra makt, er tað gott við einum orkestri sum Cowboy Junkies. Tey spæla tað tey hava hug til og lata ikki tónleikaídnaðin stýra sær. Nú er tónleikur fyrst og fremst ein søluvøra. Plátufeløg hópframleiða bólkar, ið minna um Spice Girls og Take That. Ein gevst og tveir koma í staðin. Videoløg hava fingið størri týdning enn tónleikurin. Her er tað útsjóndin, ið telir meira enn nakað annað. Tilfelags fyri næstan allar hesar bólkar er, at tey hvørki skriva tekst ella gera løg. Arbeiði hjá teimum er at syngja, dansa og síggja gott út. Hjá syngjandi konufólkum er tað ein fyrimunur at hava stór bróst og deiliga reyv. Um tey ikki hava ein tóna skaptan í heysinum, er undirornað. Tað kann alt ornast í studio.





*Jólaaftan varð døgurðin etin á middegi. Oksakjøt, sum kokkurin, Omar, hevði gjørt til*

# Heit jól

Jólini skulu vera hvít við kulda og kava. Halda vit, sum hava hesa romantisku uppfatanina av jólunum, ið vit helst hava fingið frá týskum jólamyndum og -kortum. Men soleiðis er ikki allastaðni. Eitt nú í Afrika um Saharaleiðina er eingin kavi á jólum. Alma Bjartalíð í Klaksvík helt seinastu jól í 32 hitastigum í syðra kanti av Sahara

**JÓLAHALD**
*Edvard Joensen*

– Tað var eitt sindur løgið at hugsa sær til at skula halda jól á markinum til Sahara oyðimørkina í meira enn 30 hitastigum. Men tað bar væl til hóast alt, og vit fingu eini sera hugnalig, um enn øðrvísi jól, greiðir Alma Bjartalíð í Klaksvík frá um ferð í Afrika á jólum.

Frásøgnin setur ferð á hugin, sum leitar at lýggjari støðum, nú vit sita hendan illveðursdagin í januar við køksvindeygað í Bøgøtu og hyggja at, meðan vindur og vátaslettingur strúka yvir Klaksvíkina. Troystarleysa veðrið uttan fyri ger kortini bara innihugnan enn meira fløvandi.

Alma Bjartalíð í Klaksvík var á jólum og vitjaði sonin og familju hansara í Mali í Vesturafrika, sum liggur upp móti syðru helvt av Sahara oyðimørkini. Eitt nú liggur oyðimarkarbýurin Timbuktu, sum mangan verður roknaður at liggja langt burtur, í landinum Mali.

Sonur Almu, Snorri Brend, er trúboðari í Mali. Saman við konuni og báðum døtrunum býr hann í býnum Sevaré, sum liggur uppi við Niger ánna. Ein býur við umleið 25.000 íbúgvum, greiðir Alma Bjartalíð frá.

## Øðrvísi jól

– Men hóast øðrvísi umstøðurnar komu jólini kortini spakuliga, greiðir Alma Bjartalíð frá. Verdóttirin dugdi sera væl at fáa jólahugnan fram, hóast alt.

Jólapyntið kom upp at hanga so við og við, eins og jólaløg eisini vórðu spæld. Tey høvdu bæði føroyskar og útlendskar fløgur og bond við.

Jólatræið er ikki so lætt at fáa har niðri. Í hvussu er ikki tað vanliga granntræið, vit brúka her á okkara leiðum. Men tað kundi so væl klárast við einum plastikktræi, tey høvdu við sær. Og tá so jólapakkarnir eisini vóru komnir at liggja, ja so vóru jólini komin. Eisini til teirra, sum sótu í 32 hitastigum í Sevaré uppi við Niger ánna í Mali.

Tey hava egnan kokk, trúboðarafólkini í Sevaré. Hann hevur verið kokkur hjá øðrum trúboðarum undan teimum, sum nú eru, og veit væl, hvussu fremmandu fólkini vilja hava matin, og serliga hvat tey tola at eta.

Jólaaftan varð døgurðin etin á middegi. Oksakjøt, sum kokkurin, Omar, hevði gjørt til.

Eftir døgurðan varð farið ein túr út í oyðimørkina, sum ikki er so langt burtur, har ein norskur trúboðari skipaði fyri einum sonevndum jólaspæli, sum hon hevði sett saman burtur úr Jesajasarbók úr Gamla Testamenti, greiðir Alma Bjartalíð frá.

Hóast lisið var úr Jesajasarbók, varð spælt, at tey vóru stødd á Betlehemsfløtum, har bæði hirðar og einglar vóru savnað.

Nú er tað so, greiðir Alma frá, at í Mali ganga hirðarnir, eins og øll onnur mannfólk, við transistorradio um hálsin. So Snorri hevði verið so fyrivarin, at hann hevði tikið radio við heimanífrá og gekk so við hesum um hálsin, nú hann skuldi vera røktingarmaður hesa jólanáttina á Betlehems fløtum.

– Ein sera hátíðarlig løta, hendan skýmingin jólaaftan, meðan vit í oyðimørkini fluttu okkum aftur til Jesu føðing, sigur Alma Bjartalíð.

Jólini verða mest bara hildin jóladag har niðri, greiðir Alma frá. Tað verður gjørt við, at farið verður í kirkju, og síðan fær alt kirkjuligið at eta uttan fyri kirkjuna. Tann dagin kemur nógv fólk, tí ikki er støðan øðrvísi enn so, at hjá fleiri teirra er tað rættiliga forkunnugt at fáa rís og kjøt, sum tey fáa hendan dagin. Heima við hús er kosturin vanliga hirsugreytur.

Ikki er kirkjan stór. Veggirnir eru av mold, sum flestu aðrir bygningar eisini eru. Hetta tí, at tað er svalligari, enn um bygt varð av gróti ella betongi.

Einki er inni annað enn eitt upphang, har vín og breyð kunnu standa. Altargongdin fór soleiðis fram, at prestur lat breyð niður i vínið og lat so ílætið ganga runt hond úr hond, til øll høvdu verið til altars.

Guðstænastan fór fram á Fulanimáli, so striltið var at fylgja við. Men okkurt sálmalag kendi Alma kortini aftur.

## Loftmissión

Í Mali gongur hvør maður við útvarpslurti um hálsin. Sera nógv og væl verður fylgt við tí, sum hendir, gjøgnum útvarpið. Tað kemst fyri ein part av, at illa gongur at lesa hjá nógvum, men at lurta klára tey.

Hesum hevur trúboðarin eisini fingið sær fyrimunir av, og verða útvarpsendingar við kristniboðan gjørdar og sendar á lokala málinum.

Snorri Brend er við í hesum arbeiðinum saman við øðrum trúboðarum, sum eru í umráðnum.

Snorri er sendur út av trúboðarafelagsskapinum Melm, sum er eitt samstarv millum tveir norskar felagsskapir og donsku Sudanmissiónina, haðani Snorri er sendur.

Av øðrum máli tosar fólkið bert franskt. Tað kemst av, at Mali er gamalt franskt hjáland, greiðir Alma Bjartalíð frá. Og tað var ein lítil trupulleiki hjá henni, at hon ikki dugir franskt. Tí á enskum bar einki til. Hon kundi ikki siga, hvar hon búði, um hon ikki fann heimaftur, tí tey skiltu ikki hvønn annan.

Men sera fitt og fyrikomandi var fólkið, leggur hon dent á. Smílandi og hjálpsom, tá hon stóð og fektaði við sínum teknmáli, um okkurt var, hon ikki fekk skil á. Tað bar til.

Tey hava tað gott har niðri, heilsar Alma Brend frá familjuni í Sevaré. Og tað var sera gleðiligt at síggja, hvussu nógv fólk hugsar um tey og minnist tey. Eitt nú á jólum. Bæði so og so. Tað eru tey eisini takksom fyri.